# Fólk í Havn fáa ikki meiri skatt komandi ár

**Tórshavnar Kommuna ætlar at tátta eitt sindur í komandi ár, men ætlanin er hvørki at hækka skattin ella at lække barnafrádráttin**

FÍGGJARÆTLAN
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Tað er ikki bara í Tinganesi, at tey í hesum døgum stríðast við at fáa eina fíggjarætlan at ganga upp.

Eisini í kommununum runt um í landinum, er skjøtil við at verða settur á fíggjarætlanirnar fyri komandi ár.

Ikki minst er nógv fundarvirksemi í Tórshavnar Kommunu hesar dagarnar, tí eisini í høvuðsstaðnum verður roynt at finna útav, hvussu kommunan skal rekast komandi ár.

Fíggjarætlanin hjá Tòrshavnar Kommunu kemur til fyrstu viðgerð í býráðnum í næstu viku.

Og eins og hjá landsstýrinum, ætlar Tórshavnar Býráð eisini Tórshavnar Býráð at taka fíggjarligu teknini í sól og mána til eftirtektar.

– Ábendingar eru um, at fíggjarliga framgongdin verður ikki so stór komandi ár, sum hon hevur verið og tað mugu vit leggja upp fyri í fíggjarætlanini sigur Jan Christiansen, borgarstjóri.

### Varlig fíggjarætlan

Hann sigur, at talan verður tí um eina varliga fíggjarætlan, sum verður løgd fyri Býráðið í næstu viku.

Fíggjarætlanin í ár javnvigar við 438 milliónir og næsta ár verður fíggjarlógin 445 milliónir.

Við hesum er talan bara um eina hækking upp á sjey milliónir . Sostatt er talan at kalla um ein null vøkstur, so ásannast má, at inntøkurnar eru sera varliga mettar.

Men borgarstjórin leggur kortini dent á, at, at hóast fíggjarligu útlitini ikki eru heilt so bjørt longur, er als ikki talan um kreppu og hann leggur dent á, at ætlanin er hvørki um at hækka skattin ella at lækka barnafrádráttin.

Kommunuskatturin í Havn er 18,75% og barnafrádrátturin er 4.500 krónur um árið og tað verður tað sama komandi ár.

Ætlanin er heldur ikki at taka lán, fyri at fáa roknistykkið at ganga upp.

Og Jan Christiansen sigur, at býráðið metir avgjørt, at hóast talan verður um null vøkstur í fíggjarætlanin næsta ár, fer tað at bera væl til at reka kommununa.

– Støðan hjá kommununi er tann, at vit eru at kalla skuldarfrí. Tað, vit eigar til góðar, samsvarar so dánt við tað, vit skylda.

Hann mintust kortini ikki í høvdinum, hvussu stór skuldin hjá kommununi er.

– Men hetta førir við sær, at útreiðslurnar til rentur og avdrátt eru munandi minkaðar og tí hevur kommunan hampiliga gott rásarrúm at arbeiða, hóast fíggjarætlanin stendur í stað, sigur hann.



*–Fíggjarætlanin hjá Tórshavnar kommunu fyri næsta ár, verður ein tann varligasta í nógv ár, men vit hava kortini hampiliga stórt rásarrúm, sigur Jan Christiansen*

# Jógvan við Keldu bíðar bara eftir røttu løtuni

**Hann heldur at løgtingslimir úr útjaðaranum mugu samstarva meiri og hann ætlar at taka stig til at endurstovna umstríddu útjaðarasamgonguna í Løgtinginum**

SAMGONGAN
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Jógvan við Keldu bíðar bara eftir røttu løtuni, so tekur hann stig til at endurstovna umstríddu útjaðarasamgonguna í Løgtinginum*

– Útjaðarin í Føroyum verður meiri og meiri afturútsigldur. Og tað kunnu løgtingslimir úr útjaðaranum ikki bara sita tigandi og hyggja at.

Jógvan við Keldu, løgtingslimur úr Klaksvík, heldur, at tinglimir úr útjaðaranum mugu samstarva nógv meiri enn teir gera í dag.

Tí heldur hann at tað hevði verið rætt at endurstovna umstríddu útjaðarasamgonguna, sum var í Løgtinginum fyri nøkrum árum síðani.

Og hann heldur, at tað er so mikið umráðandi at hetta verður gjørt, at hann bara bíðar eftir røttu løtuni, sigur hann.

Hendan útjaðarasamgongan var ein óformlig samgonga sum gekk tvørtur um flokspolitiskt mark. Eitt slag av skuggasamgongu í Løgtinginum undir liðini á landsstýrissamgonguni.

Endamálið við hesi útjaðarasamgonguni var at fáa tingmenn úr útjaðaranum at samstarva meiri fyri at fáa meiri at henda úti um landið.

Men tað var nógv rok um hesi útjaðarasamgonguna tí summi hldu, at hetta var óloyalt ímóti landsstýrissamgonguni og tað endaði eisini við, at hon fór rættiliga skjótt fyri bakka aftur.

– Eg var ómetaliga harmur um, at hon fór fyri bakka og eg haldi eisini, at orsøkin til at hon fór aftur í ommu sína var dekan ov grunn, sigur løgtingsmaðurin úr Klaksvík.

### Standa ógvuliga spjadd

Jógvan við Keldu staðfestur, at løgtingslimir úr Suðurstreymoy tosa nógv saman og samstarva nógv meiri enn fólk flest kanska geva sær far um, tá ið mál eru á skránni, sum kunnu gagna høvuðsstaðarøkinum.

Hinvegin standa tingmenn úr útjaðaranum ógvuliga spjaddir. Avleiðingin av tí er, at útjaðarin verður meiri og meiri afturútsigldur afturímóti høvuðsstaðarøkinum.

At tað ber til at gera nakað munagott fyri útjaðaran, ivast hann ikki í.

– Tórbjørn Jacobsen talaði Roma beint ímóti og legði Almanna- og heilsuskúlan í Suðuroy við einum pennastroki. Tað sama gjørdi Jørgen Niclasen við Skipasýnið.

Øll minnast tann levint og gang, sum tinglimir úr Suðurstreymoy hildu um hesar báðar avgerðirnar.

Hetta hendi bara tí at hesir báðir landsstýrismenninir av tilvild eru bygdarmenn. Fyri at fáa nakað veruligt á skafti fyri útjaðaran, er tað kortini neyðugt at fáa eitt meiri skipað samstarv ímillum tinglimir úr útjaðaranum.

– Men slíkt krevur nýhugsan. Men hava við einar 18-20 tinglimir úr útjaðaranum, sum seta okkum saman at finna felags loysnir fyri, hvussu vit kunnu byggja útjaðaran út, ivist eg ikki í, at nógv kann fáast á skafti, sigur Jógvan við Keldu

Hann heldur ikki, at eitt slít samstarv skal vera fromligt. Tað kemur meiri at byggja á álit ímillum teir ymsu tinglimirnar.

Hann ásannar, at hetta kann vera trupult tí tað ber heldur ikki til at gloyma, at nógvir tinglimir úr útjaðaranum eisini eru í sjálvari landsstýrissamgonguni.

Kortini heldur hann ikki, at hetta er at vera óloyalur ímóti landsstýrisamgonguni.

– Vit eru vald á ting at umboða ávís valdømi. Og tað eiga vit at gera, eins væl og tinglimir úr Suðurstreymoy umboða sítt valdømi - og tað gera teir nógv meiri samskipað enn nógv kanska gera sær far um, tí teir tosa nógv saman.

– Hóast vit eru limir í eini samgongu, ber tað ikki til lata seg niðurstemma at kalla í hvørjum einasta máli, sigur Jógvan við Keldu.

– Hóast vit eru í samgongu, ber tað ikki til tingmenn úr útjaðaranum sita tigandi og hyggja at, ímeðan teir verða niðurstemmaðir at kalla í hvørjum einasta máli, sigur Jógvan við Keldu. Hann heldur, at tingmenn úr útjaðaranum mugu samstarva meir.





*Høgni Hoydal hevur seinastu mánaðirnar røkt starvið sum landsstýrismaður við mentamálum. Nú handar hann stafettina víðari til Annitu á Fríðriksmørk*



*Løgmaður handaði Annitu á Fríðriksmørk gávur*

# Annita vil køla heita sessin av



*Annita í trappunum í Tinganesi, og nú kann hon kalla seg landsstýriskvinnu*

NÝGGJ LANDSSTÝRISKVINNA
*Jan Müller*
*Jan@sosialurin.fo*
*Myndir: Jens K Vang*

– Hetta hevur verið ein sera heitur sessur, og eg skal royna at gera mítt til at køla hann av helt nýggja landsstýriskvinnan í mentamálum, Annita á Fríðriksmørk fyri, tá hon seinnapartin mikudagin alment varð sett í henda so nógv umrødda sess á samkomu í Tinganesi.

Eftir at Anfinn Kallsberg, løgmaður boðaði frá, at Annita á Fríðriksmørk tekur við starvinum sum landsstýriskvinna í mentamálinum og ynskti henni alt gott og vónaði at fáa eitt gott samstarv helt landsstýriskvinnan fyri, at hon sær fram til hetta avbjóðandi og spennandi starvið.

Hon vónaði, at hon fór at megna at fremja góð avrik fyri bæði mentanina og undirvísingarverkið og legði upp til eitt fruktagott og gevandi samstarv við øll tey fólkini, sum virka innan fyri hesi so stóru og týðandi øki í samfelagnum.

Løgmaður viðgekk í røðu síni, at sessurin hevur verið nógv útsettur, men helt fyri, at nýggja landsstýriskvinnan, sum heldur ikki er nakar ársungi í politikki, fer at klára hesa uppgávuna væl.



*Annita saman við familjuni*



*Hans Jacob Joensen, bispur, var ein av teimum, sum heilsaði upp á nýggja landsstýrismannin*